# Jesus – offur, jødi ella...?

HANS ANDRIAS SØLVARÁ



**Vánalig gransking**
Kristian Hansen hevði 13. oktober nakrar viðmerkingar til ummæli hjá mær av nýggjari bók hjá Søren Wibeck um tann søguliga Jesus, sum eg lat prentað í Sosialinum 1. september. Kristian heldur, at granskingin hjá Marcus Borg, sum Søren Wibeck m.a. endurgevur, er "*vánalig*". Hann loyvir sær enntá at ivast í, um tann kompitenti gudfrøðiprofessarin "*yvirhøvur hevur lisið Markus*", tá hann heldur uppá, at tann kristni syndoffurtankin, ikki finst í Markusevangeliinum.

Eg havi ongan áhuga í at verja sjónarmið hjá Marcus Borg móti skuldsetingunum um vánaligt handverk frá Kristian, men eg kundi latið hann sjálvan fingið orðið. Marcus Borg er ein ógvuliga kompitentur kristin gudfrøðiprofessari við Origon State University, sum hevur nýtt alt sítt vaksna lív upp á at granska Nýggja Testamenti. Hann man sjálvur vera maður fyri at verja seg móti skuldsetingunum um vánaliga gransking frá Kristian. Og Marcus Borg kennir sjálvandi Markus 14:24: "*Hetta er blóð mítt, blóð sáttmálans, sum verður úthelt fyri mongum*", sum sambært Kristian prógvar, at syndoffurtankin finst hjá Markusi. Syndoffurtankin verður bara heldur ikki nevndur í hesum versinum hjá Markusi, men tað er áhugavert, at hjá Matteusi, sum skrivaði av eftir Markus eini 15 ár seinni (um 85 e. Kr.), eru orðini "*til fyrigevingar syndanna*" (26:28) løgd aftur at markusversinum.

Sjálvur tekur Marcus Borg soleiðis til, eftir at hava greitt frá um offurdeyða í breiðari merking, t.e. offur fyri m.a. sínum kærleika til Gud ella offur fyri síni trúgv, sum nógv kristin gjøgnum søguna eru deyð sum offur fyri: "*Tann meira serstaka merkingin av offur í mun til deyða Jesusar tosar um eitt umboðandi offur **fyri synd**, ein deyða fyri heimsins syndir. Hendan merkingin er ikki til staðar í søguni hjá Markusi um langafríggjadag; hon er yvirhøvur ikki har. Sanniliga, hendan merkingin kann væl vera fráverandi í Markusevangeliinum sum heild. Tær tríggjar fyriboðanirnar um deyða Jesusar miðskeiðis hjá Markusi siga ikki, at Jesus noyddist at fara til Jerusalem at doyggja fyri heimsins syndir. Heldur vísa tær til Jerusalem sum avrættingarstaðið hjá myndugleikunum. Tað er bara eitt brot í øllum Markusevngeliinum, sum kundi havt eina umboðandi offur merking. Tað er í brotinum aftan á triðju fyriboðanina um hansara deyða, meðan Jesus hjá Markus tosar við lærusveinarnar fyri triðju ferð um týdningin av at fylgjast við honum, har hann sigur: "Tí at menniskjusonurin er ikki heldur komin fyri at vera tænaður, men fyri at tæna og at geva lív sítt sum **loysigjald** fyri mong" (10:45). Fyri nógv kristin ljóðar orðið "loysigjald" sum offur mál, tí vit tosa onkuntíð um Jesus sum loysigjaldið fyri okkara syndir. Men tað hevur nærum heilt sikkurt ikki hendan týdningin hjá Markusi. Grikska orðið, sum verður týtt til loysigjald (lutron), er í Bibliuni ikki nýtt í høpi við gjald fyri synd, men tað sipar til gjald fyri at seta fangar fríar (ofta krígsfangar) ella trælir (ofta gjaldstrælir). Lutron er ein háttur at loysa úr trældómi*". Sambært Marcus Borg ofraði Jesus sítt lív fyri sínum kærleika til Guds (t.e. eitt rættvíst) ríki í samtíðini - ikki fyri allar heimsins framtíðar syndir. So kunnu fólk sjálvi meta um, hvørt tey hava álit á Kristian Hansen ella Marcus Borg. Sjálvur havi eg onga avgjørda meining um svarið upp á umstrídda spurningin viðvíkjandi týdninginum av deyða Jesusar hjá Markusi.

Harafturímóti havi eg avgjørdar meiningar um nøkur onnur uppáhald í greinini hjá Kristiani, sum hann bara kemur við og als ikki roynir at grundgeva fyri.

**Uppgerð við evangeliini**
Kristian sigur t.d., at bókin hjá Søren Wibeck "*ger upp við stóran part av evangeliinum*". Tað er eitt uppáhald, sum ikki kann standa ósvarað. Bókin viðgerð bíbilsku tekstirnar, hon ger á ongan hátt upp við teir. At innihaldið í teimum bíbilsku tekstunum stundum er ósannlíkt, onkuntíð mótstríðandi og at seinni høvundar í fleiri førum beinleiðis hava lagt aftur at og broytt tekstirnar, tað eru bara sannroyndir, sum eingir seriøsir bíbliugranskarar kunnu síggja burtur frá. Tí hevði tað eisini verið beinleiðis ósakligt av Wibeck ikki at nevnt tað. Møguliga er tað eisini grundin til, at Kristian einki leggur í at gera viðmerkingar til hesi viðurskifti, men heldur fer eftir meira umstríddum uppáhaldum hjá Marcus Borg, sum Søren Wibeck annars sakliga setur upp ímóti øðrum sjónarmiðum.

Eg royndi í ummælinum at vísa á, at høvundurin, Søren Wibeck, er so mikið sakligur, at hann t.d. endurgevur bæði sjónarmið hjá C. S. Lewis og Marcus Borg. Tann fyrri grundgevur fyri, at Jesus segði seg vera Gud, tann seinni grundgevur fyri, at Jesus ongantíð segði seg vera Gud. Eg um- og viðmælti bókina hjá Søren Wibeck, tí tílíkar bøkur kunnu øll fáa nakað burturúr, kristin eins væl og ikki-kristin. Nú veit eg ikki, hvat Kristian skilir við góða gransking, men kanska hevði hann hildið bókina verið góða, um hon einans hevði endurgivið bíbilska tekstin og sjónarmið hjá C. S. Lewis, sum sambært Marcus Borg byggja á orðingar hjá Jóhannesi, sum "*teir flestu leiðandi granskarar í dag vilja siga, at Jesus ongantíð segði ... um seg sjálvan*". Eftir mínum tykki hevði tað verið beinleiðis ósakligt av Søren Wibeck at latið bíbliutrúgv sjónarmið hjá C. S. Lewis staðið ósvarað - serliga um tað er so, at teir flestu leiðandi granskarar eru samdir við Marcus Borg í, at nevndu guddómligu Jesus orðingar hjá Jóhannes ikki stava frá Jesusi sjálvum.

Søren Wibeck ger ikki annað enn tað, sum ein hópur av granskarum ger hvønn dag; hann viðger bíbilska tekstin kritiskt. Men summi kristin tykjast halda, at antin noyðast granskarar at viðurkenna, at Bíblian er ein feilfrí guddómlig opinbering, ella eisini gera teir upp við Bíbliuna. Tað tykjast bara vera tvinnir kostir at velja ímillum. Men soleiðis verða eingir (fornir) tekstir viðgjørdir av seriøsum søgufrøðingum. Tað snýr seg um at fáa tær álítandi upplýsingarnar úr keldunum og lata restina liggja. Fornir tekstir hava t.d. upplýsingar um, at m.a. Augustus og Alexandur tann Stóri vóru guddómligir og føddir av moyggj, men eingin seriøsur søgufrøðingur tekur tílíkar upplýsingar í álvara. Tað merkir ikki, at teir gera upp við tekstirnar; teir viðgera bara innihaldið í teimum kritiskt.

**Góð bíbliugransking**
Sum áhugaður leikmaður haldi eg meg ikki hava førleika til at meta um ella leggja granskingina hjá tí komtitenta professaranum Marcus Borg undir at vera "*dømi um vánaligt granskingararbeiði*", soleiðis sum Kristian ger uttan at himprast. Sum søgufrøðingur havi eg hinvegin ikki stóra virðing fyri niðurstøðum, sum uttan kritiskar viðmerkingar (uttan viðmerkingar yvirhøvur) eru grundaðar á afturlítandi orðingar úr tekstum í Nýggja Testamenti, sum eru festir á blað umleið 40-70 ár eftir deyða Jesusar, vanliga av lærusveinum, sum ikki kendu hann persónliga: t.d. at "*Jesus tosar um ... deyða Sín*", "*Jesus tosar um at gjalda við egnum lívi*", sum Kristian ger í síni viðmerking. Tað er møguligt, at tílík "trúgv" er góð gudfrøðigransking (tað havi eg ikki so nógv skil fyri), men tað er og verður rættiliga ivasom søgugransking. Tað er hvørki Jesus ella Gud, sum tosar í evangeliunum; tað eru evangelistar, sum eftir øllum at døma ongantíð hittu ella kendu tann søguliga Jesus, sum seinni siga sínar søgur um ta krossfestu hetjuna.

Eitt hevur Marcus Borg í øllum førum rætt í, og tað er, at vit hava onga óhefta atgongd til tann søguliga Jesus. Longu tá teir fyrstu tekstirnir vórðu festir á blað funnust fleiri gudfrøðiligar tulkingar av lívinum hjá Jesusi. Hóast Kristian tykist halda tað øvugta, so er Marcus Borg fullgreiðir yvir, at allir tekstir í Bíbliuni eru gudfrøðiligir, eisini Markusevangeliið, men tað elsta evangeliið hevur sambært honum ikki somu útlegging av Jesu lív og deyða sum aðrir tekstir. Tað eru hesar ymisku tulkingarnar av lívi Jesusar, sum viðhaldsfólk hava fest á blað, sum vit hava atgongd til. Tað merkir, at keldurnar á ongan hátt eru óheftar. Eins og allar aðrar keldur, sum eru festar á blað av viðhaldsfólkum, eru tær litaðar. Tað er v.ø.o. eingin ivi um, at Bíblian er at rokna sum "*orð um Guð*" og ikki "*Guds orð*".

Spurningurin er, hvat tað er fyri ein Jesus, sum fjalir seg aftanfyri hetjusøgurnar. Her er kritisk gransking neyðug og ikki banalar endurgevingar av tekstinum.

---

# Ábyrgd av egnum fíggjarviðurskiftum

BJØRT SAMUELSEN



Heimsfevnandi fíggjarkreppan ger tað meira aktuelt enn nakrantíð at hava innlit í og skil á fíggjarkervinum. Viðgerðin av bankatrygdarnetinun vísti greitt, at vit als ikki hava ta ávirkan og ábyrgd vit eiga at hava av okkara egnu fíggjarviðurskiftum.

Fólkatingið og Løgtingið samtyktu í farnu viku sonevnda bankatrygdarnetið. Hetta fekk fólkatingslimin Edmund Joensen at stórfegnast um, at tosið um føroyskt fíggjareftirlit er tagnað. Men júst viðgerðin av trygdarskipanini vísti heilt greitt, hvussu langt vit eru frá at hava neyðugt innlit í og avgerandi ávirkan á okkara egna fíggjarkervi. Tað er ein álvarsom støða.

**Eingi fingramerki**
Føroysku bankarnir ynsktu at gerast partar av bankatrygdarskipanini. Tjóðveldi tók undir við hesum, men vístu vit samstundis á eina røð av spurningum og óavgreiddum viðurskiftum. Tá føroysku bankarnir eru partur av skipanini, áttu føroysku myndugleikarnir sjálvsagt at verið við í arbeiðinum at orða lógina. Men, sum tað kom fram í Løgtinginum, so hevur bert hissini samband verið millum føroysku og donsku myndugleikarnar um málið, og tí vóru eingi føroysk fingramerki at hóma í lógini.

Á leið 150 bankar eru við í skipanini, og kunnu hesir í mesta lagi koma at gjalda 35 milliardir krónur til samans. Henda upphædd varð sett sum 2% av donsku BTÚ. Føroysku bankarnir koma eftir hesum leisti í ringasta føri at gjalda nærri eina hálva milliard krónur til skipanina, sum er lutfalsliga nógv.

Verður tørvurin størri enn 35 mia, ber danski staturin restina av útreiðslunum. Tá føroyskir bankar nú gerast partar av skipanini, merkir tað so eisini, at landskassin kemur at bera sín lutfalsliga part, um kravið til grunnin verður hægri enn 35 mia? Um so er, hvat kemur hetta at merkja fyri landskassan?

Trygdarskipanin skal eftir ætlan virka í tvey ár. Um pengarnir í grunninum ikki verða nýttir, fáa Føroyar tá sín lutfalsliga part afturgoldnan í 2010? Sambært lógini fella pengarnir – eisini teir frá føroysku peningastovnunum – í danska statskassan.

**Avtøkufelagið høvuðsleiklut**
Danska búskaparmálaráðið setir á stovn eitt partafelag nevnt Avtøkufelagið. Sambært lógini er tað danska búskaparmálaráðið, sum eigur hetta partafelag. Føroyingar eiga sostatt ikki part í felagnum. Nevndin, sum verður vald at stýra felagnum, kemur at vera ein ómetaliga týdningarmikil nevnd, bæði meðan skipanin virkar, og ikki minst tá hon verður tikin av. Tí átti landsstýrið sjálvandi at tryggja sær møguleika at velja nevndarlimir, og soleiðis tryggja sær ávirkan.

Nevnda Avtøkufelag, kemur m.a. at peika á keyparа, í teimum førum har peningastovnur ikki ber seg. Um ein føroyskur banki fær trupulleikar, er vandi sostatt fyri, at hann verður seldur útlendskum/donskum banka. Føroya Landsstýri - ella føroyskar fyritøkur – kunnu sostatt ikki fara inn og keypa bankan - uttan so at Avtøkufelagið hevur givið sítt vælsignilsi. Tað eru danska Fíggjareftirlitið og danski búskaparmálaráðharrin, sum hava síðsta orðið at skula hava sagt.

**Alt vald til danska Fíggjareftirlitið**
Fíggjareftirlitið kann fara beinleiðis inn at stýra bankunum, og kann eitt nú nokta bankunum at flyta kapital millum egnar fyritøkur. Tað kann eisini fara inn og seta nevndarlimir og stjórar frá. Danska fíggjareftirlitið hevur sostatt sera víðfevndar heimildir í okkara fíggjarkervi. Hetta er eitt øgiligt vald at lata øðrum, og eg vóni, at landsstýrið ger alt sum stendur í tess makt at tryggja okkum ávirkan her.

Nú hendan skipanin kemur at virka, er eingin ivi um, at tað fer at vaksa um áhugan hjá peningastovnum og øðrum at læna donskum (og føroyskum) bankum pengar. Tað er gott, men sum nevnt verður í donsku viðmerkingunum til lógina, so er samstundis ein greiður vandi fyri, at spekulerað verður í skipanini. Tí verður ymiskt gjørt fyri at byrgja upp fyri hesum.

Vit vita, at føroyskir bankar mest sannlíkt eru lutfallsliga betri fyri enn nógvir av teimum donsku og útlendsku bankunum, ið verða við í skipanini. Eiga vit ikki eisini at hava møguleika fyri at ávirka og byrgja fyri spekulatiónsvandanum?

Hetta eru nakrir av teimum spurningum, sum als ikki vórðu nóg væl lýstir frá landsstýrisins síðu, áðrenn lógin varð samtykt.

**Kundu styrkt okkara støðu**
Tjóðveldi mælti saman við hinum andstøðuflokkunum til fleiri broytingar í lógini, júst fyri at tryggja føroysku áhugamálini betri. Broytingaruppskotini fullu tíverri.

Samstundis torir Edmund Joensen ikki at hugsa um avleiðingarnar, um vit yvirtaka fíggjarøkið. Eg tori ikki at hugsa um, at vit framhaldandi lata alla ábyrgd upp í hendurnar á øðrum.

Skuldi nakar ivast, so er Tjóðveldi framvegis fremsti forsprákari fyri at vit taka við ábyrgdini av okkara egna fíggjarkervi og sjálvi hava eftirlit við bankunum. Fegin í samstarvi við onnur lond. Vit eru als ikki nøgd við, at tað er danski búskaparmálaráðharrin - og ikki føroyski fíggjarmálaráðharrin - sum er fyrstur at fáa boðini frá Fíggjareftirlitinum um støðuna hjá føroysku bankunum.